umhvørvisstovan

HVANNASUNDS KOMMUNA

740 HVANNASUND
FØROYAR

Argir hin 9. desember 2011
Málsnr.: 11/00009-16
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Heidi Hansen

**Spillivatnsætlanin góðkend**

Við hesum skal verða boðað frá, at Umhvørvisstovan hin 09.12.2011, sambært § 18, stk. 2 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, við seinni broytingum, og § 4, stk. 2 í kunngerð nr. 111 frá 7. september 2009 um spillivatn, hevur góðkent spillivatnsætlanina hjá Hvannasunds kommunu fyri tíðarskeiðið 2011-2015.

## 1. Umsókn og viðgerð

Umhvørvisstovan fekk hin 03.01.2011 spillivatnsætlanina hjá Hvannasunds kommunu til góðkenningar (mál nr. 11/00009-1). Ætlanin er gjørd av kommununi, ið hevur samtykt ætlanina tann 26.01.2011. Í samband við viðgerð av ætlanini hevur Umhvørvisstovan verið í samband við kommununa, og tann 08.12.2011 var ein dagførd ætlan send Umhvørvisstovuni til góðkenningar ( mál nr. 11/00009-15).

Út frá eini heildarmeting av upplýsingunum í dagførdu ætlanini, ið varð innsend tann 08.12.2011, verður mett, at komandi spillivatnsskipan í kommununi lýkur ásetingarnar í §§ 8-13 í kunngerðini um spillivatn.

Hvannasunds kommuna hevur tó søkt um undantak í Múla frá ásetingunum í § 10, stk. 1 og § 11, stk. 1 í kunngerðini um spillivatn, sum sigur at spillivatnsútleiðingar skulu leiðast út á sjógv og skulu í minsta lagi verða ein metur undir størstu fjøru. Orsøkin til hetta er at har er nógv brim og høgur bakki og tí trupult at føra útleiðinga niður á sjógv. Bert fýra húski eru í Múla, og heilt fá fólk eru har dagliga, t.v.s. at talan er um eina lítla útleiðing. Spillivatnið verður tó leitt allanvegin oman til bakkatromina.

Við omanfyri nevndu grundgevingum, verður undantak givið við heimild í § 11, stk. 2 í kunngerðini um spillivatn.

Góðkenningin umfatar einans krøv ásett í spillivatnskunngerðini, t.v.s. tann umhvørivsliga partin av spillivatnætlanini. Góðkenningin tekur ikki støðu til hvørjar tekniskar loysnir eru valdar og um tekniskU viðurskiftini sum heild eru í lagi, so sum dimensionering o.s.fr. Hetta er ábyrgdin hjá kommununi.

Um tað seinni vísir seg, at spillivatnsskipanin elvir til dálking, t.d. uppsavnan av evnum og tilfari, til slóðir í sjónum ella til aðrar broytingar í umhvørvinum, skal kommunan, sambært § 10, stk. 3 í kunngerðini um spillivatn, fremja bøtandi atgerðir, so sum økta reinsing ella føra spillivatnið longur út.

## 2. Kunngerð og kæra

Góðkenningin av spillivatnsætlanini verður lýst á heimasíðu okkara og við almennari lýsing, har tað eisini verður kunnað um at góðkenningin, sambært § 60, stk. 2 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, við seinni broytingum, kann kærast til landsstýrismannin við umhvørvismálum innan 4 vikur frá at góðkenningin er alment kunngjørd.

Kærurætt hava tey, sum avgerðin hevur týðandi persónligan týdning fyri.

Suni Petersen, settur deildarleiðari

/

Heidi Hansen, umhvørvisviðgeri

**Avrit:** Landslæknin, Sigmundargøta 5, Postboks 9, FO-110 Tórshavn